# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eg vil heldur siga, at hetta er eitt lítið plástur á eitt stórt sár*
*Sámal Joensen, VÍF*



*Karoly Potemkin gjørdist stóra hetjan við Løkin, tá hann við tveimum málum seinasta korterið syrgdi fyri, at øll stigini vórðu verandi í Runavík*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

NSÍ-HB 2-1 (0-0):

# Vespurnar prikaðu aftur

*NSÍ*

*HB*

**Eftir ein fyrra hálvleik, har NSÍ sat á øllum, tók HB yvir eftir steðgin og legði seg á odda. Men við einum góðum endaspurti og tveimum málum fekk NSÍ svarað aftur og vunnið. Potemkin, sum brendi nógvar ferðir í fyrra hálvleiki, skoraði bæði málini**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Fyri tey, sum hvørki hildu við øðrum ella hinum liðinum – teirra millum landsliðsvenjarin, Brian Kerr – mundi dysturin í Runavík í gjárkvøldið vera ein fín fótbóltsuppliving. Bæði NSÍ og HB høvdu løtur í dystinum, har liðini vístu seg frá síni allarbesta síðu, og tað einasta, ið ikki eydnaðist í so máta, var at tey gjørdu tað í senn.

Ta allarfyrstu løtuna tóktust gestirnir at betur upplagdir, men so brast hann brádliga á við ringasta ódnarveðri – hin vegin. Hjalgrím Elttør var sendur avstað í vinstru síðu og spældi stutt til Boga Løkin, sum sendi víðari til Károly Potemkin, ið smekkaði til við síðuna av. Í sama minutti sendi Jann Martin Mortensen bóltin inn til Potemkin, sum heilfluktaði, men mátti síggja kjansin brendan, tí Símun Rógvi Hansen í HB-málinum við einari meistarligari bjarging fekk neva bóltin beint upp um yvirliggjaran.

Tað steðgaði ikki her, og serliga stóð Potemkin frammarlaga í myndini, tí hann var alla tíðina maðurin, sum fekk møguleikan at enda álopini. Innan fyri tveir minuttir hevði hann fýra royndir á HB-málið, harav tær tvær vóru úr púra fríari støðu, men ikki bar til at fáa bóltin inn, so brendaroykurin hevði hug at breiða seg við Løkin…

## Væl komið aftur

HB sást stórt sæð einki til í fyrra hálvleiki, og einasti stóri kjansurin fall fyri rangstøðu. Í staðin kundi Jóhan Troest Davidsen havt lagt heimaliðið á odda stutt fyri hálvleik, tá hann við høvdinum sendi eitt fríspark frá Einari Hansen ímóti málinum. Men enn eina ferð vísti HB-málverjin síni bestu kynstur og fekk meistarliga vart fyri og jústað bóltin út um stongina.

Beinanvegin í seinna hálvleiki sást, at HB ikki ætlaði at spæla enn ein hálvleik av sama slagi. Hinvegin hevði NSÍ ilt við at finna taktina aftur, og sjey minuttir eftir steðgin var tað HB, ið kom á odda. Bólturin kom innfyri úr vinstru síðu, og mitt fyri megnaði ein hálvavegna liggjandi Rógvi Poulsen millum tveir passivar verjuspælarar at prika bóltin inn.

Hetta var sum ein spann av køldum vatni til vespurnar, ið annars høvdu prikað so nógv, og NSÍ var skelkað av hesum málinum ímóti sær. Men spakuliga byrjaði heimaliðið at ota seg innaftur í dystin, og við góðari hjálp frá skilagóðum innskiftingum eydnaðist at seta meira trýst undir ketlarnar.

So við og við byrjaði dysturin aftur at líkjast fyrra hálvleiki, nú NSÍ aftur fekk síðurnar meira við, og tað gav úrslit, tá 12 minuttir vóru eftir. Einar Hansen sendi fríspark inn í HB-brotsteigin, har Károly Potemkin tók væl ímóti og við vinstra beini smekkaði bóltin í málið til 1-1.

Tíðin arbeiddi nú ímóti NSÍ, sum vissuliga hevði uppiborið at vunnið, men tó sá út til at missa tvey stig. So var tað, bara hálvanannan minutt fyri tíð, at Høgni Madsen, sum vann eitt hav av bóltum í gjárkvøldið, vann eitt útspark frá HB-málverjanum og sendi fram til Potemkin. Hann setti ferð á millum miðverjuspælararnar hjá HB og gjørdist leysur ímóti málinum, har hann kalt og kyniskt setti bóltin inn og avgjørdi tað heila.

Ein søtur sigur til NSÍ, sum harvið fekk hevnt steypatapið ímóti HB skírisdag, umframt at stigini røkka til eitt triðjapláss, nú trý umfør eru farin. Sum dysturin háttaði seg, var tað sera sterkt komið aftur av NSÍ ímóti HB, sum fekk fyrsta ósigurin í ár og tí er trý stig frá toppinum.

## FAKTA um dystin

**NSÍ-HB 2-1 (0-0)**
**0-1 Rógvi Poulsen, 52.**
**1-1 Károly Potemkin, 78.**
**2-1 Károly Potemkin, 89.**
**Dómari: Petur Reinert**
**NSÍ: Meinhardt Joensen – Jónhard Fredriksberg, Óli Hansen, Jóhan Troest Davidsen, Einar Hansen – Jann Ingi Petersen (Klæmint Olsen, 75.), Høgni Madsen – Jann Martin Mortensen (Jústinus R. Hansen, 70.), Bogi Løkin (Øssur Dalbúð, 87.), Hjalgrím Elttør – Károly Potemkin**
**Gul kort: Óli Hansen, Hjalgrím Elttør, Károly Potemkin**
**HB: Símun Rógvi Hansen – Pætur Jørgensen, Hans á Lag, Jón Nielsen (Tróndur Sigurðsson, 90.), Rani Debes Christiansen (Mortan úr Hørg, 86.) – Kári Nielsen, Jóhan Ejvind R. Mouritsen (Bjarni Jørgensen, 83.), Fróði Benjaminsen, Milan Kuljic, Rógvi Poulsen – Andrew av Fløtum**

# Potemkin: Mín besti dystur

**Høvuðspersónurin við Løkin í gjárkvøldið, Károly Potemkin, sum við tveimum málum tryggaði NSÍ sigurin, heldur teir mongu brendu kjansirnar vera prógv fyri, at hann altíð er til reiðar at skora**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tvífaldi málskjúttin hjá NSÍ í gjárkvøldið, Károly Potemkin, er sera fegin um sigurin, sum var neyðugur, skuldi NSÍ fylgja við í toppinum. Hann heldur, at liðið spældi væl í fyrra hálvleiki, og hóast nógvir kjansir vórðu misbrúktir, varðveittu teir alla tíðina trúna uppá, at teir kundu vinna dystin.

– Tí var tað sera gott, at vit fingu vent dystinum í seinna hálvleiki, sigur Potemkin, ið heldur hetta kanska vera hansara besta dyst, síðani hann kom til Føroya at spæla fótbólt.

Hann ásannar, at júst hann brendi nógvar kjansir ta góðu løtuna hjá NSÍ í fyrra hálvleiki, men heldur hetta bara vera prógv fyri, at hann altíð er til reiðar at skora.

– Eg má royna at vera meira konsentreraður, tá kjansirnir koma, sigur Károly Potemkin.

## Spell at missa stig

Hinvegin hevur liðformaðurin hjá HB, Fróði Benjaminsen, ikki so nógv at vera nøgdur við eftir tapið ímóti NSÍ. – Vit koma framum í seinna hálvleiki, og tí er tað sera spell, at vit skulu lata tvey mál inn ímóti endanum, staðfestir hann.

– Eftir at vit hava fingið málið, koyrir spælið kanska ikki líka væl, men vit eru so á odda 1-0, og tá helt eg ikki, at teir vóru so øgiliga vandamiklir. Men so fær NSÍ mál við einum deyðbólti, og tá satsa vit kanska eitt lítið sindur, sigur Fróði Benjaminsen.

Hann heldur, at innsatsurin hjá HB var í lagi og somuleiðis spælið til tíðir, men at tað bara ikki var nóg gott. – Tað er spell at missa trý stig nú, tí tað merkir, at vit ikki eru í toppinum meira, sigur hann.

vodafone deildin

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 6 | 3 | 3 | 9 |
| 2 | Víkingur | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 10 | 4 | 6 | 7 |
| 3 | NSÍ | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 7 | 3 | 4 | 7 |
| 4 | EB/S | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 5 | 2 | 3 | 6 |
| 5 | HB | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 5 | 3 | 2 | 6 |
| 6 | AB | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 4 | 4 | 0 | 3 |
| 7 | B68 | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 2 | 6 | -4 | 3 |
| 8 | KÍ | 3 | 0 | - | 2 | - | 1 | 3 | 4 | -1 | 2 |
| 9 | ÍF | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 1 | 6 | -5 | 0 |
| 10 | 07 Vestur | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 4 | 12 | -8 | 0 |